# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



7. august fingu Bjartur og Joana ein lítlabeiggja, sum er 55 cm. langur og vigaði 4550 gr. Foreldrini eru Maibritt D. og Jónálvur Johannesen, Kollafjørður



6. august fingu Sára, Rúna og Birita eina lítlasystur, hon vigaði 3400 g og var 52 cm long. Foreldrini eita Karina Magnussen og Sølvi Kristiansen úr Vági.



8. august fekk Sanna Emilia Dulavík hendan fitta lítlabeiggjan. Hann vigaði 3250 gram og var 52 cm langur. Foreldrini eita Bartal og Monika og búgva tey í Aabybro í Danmark

15. august fingu Maiken og Remi Hammer, Hvalba, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 2900 gr.

20. august fingu Malena Hejnesen og Jóhan Heini Hejnesen, Viðareiði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

21. august fingu Súsanna Kelduberg og Hans Andrias Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3150 gr.

22. august fingu Guðrið Hjalt, Vágur og Sveinur Bech, Porkeri, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2970 gr.

25. august fingu Turið Reinert og Rói Johannessen, Gamle By, Svøríki, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4120 gr.

25. august fingu Frida og Peter Holm, Hoyvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3420 gr.

25. august fingu Lisbeth Laursen og Bárður Michelsen, Tórshavn og Maibrit eina lítlasystur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

25. august fingu Sheila Sigmundsdóttir og Bergmann Finnsson, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3900 gr.

25. august fingu Anja Mouritsen Møller og Heini Magnusson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 43 cm. long og vigaði 2080 gr.

26. august fingu Charlotta og Remy á For, Nes, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

28. august fingu Eyðna Vidtfeldt og Tóri Restorff Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 30. august giftas Ina Hyttel og Peter Hammershaimb bæði í Havn. Vígslan verður í Aarhus Domkirke kl 14. Veitslan verður fyri innbodnum hjá Inas foreldur á Gl. Essendrup frá kl 16.

Leygardagin 30. august kl. 14.30 giftast í Hirtshals kirkju, Oluffa Djurhuus Sandur og Thomas Pedersen Hirtshals. Brúdleypsadressan er Hotel Strandlyst, Strandvejen 20 Tornby.

**Prógv**

Fríggjadagin 15. august 2008 vardi Gunnar Restorff Ph.D. ritgerð sína Classification of non-simple C*-algebras á Matematisk Institut á Københavns Universiteti.

**70 ár**

30. aug. verður Amy Strøm, Porkeri 70 ár. Føðingardagurin verður hildin frá kl. 14.00.

**70 ára føðingardagur**

28. august fylti Poula Strøm Vágur 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá Kirstin og Hans J. leygardagin 30. aug frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

# Føðingardagar og gullbrúdleyp

17. august fylti Albin Funn á Válinum 75 ár, og 18. oktober fyllir Hildibjørt Funn á Válinum 70 ár.

Góðu foreldur, verforeldur, omma, abbi, langomma og langabbi.

Vit vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku við teimum stóru døgunum.

Vit vilja takka fyri alt tað, tit bæði eru fyri okkum og takk fyri tann góða blíðskapin, tit altíð hava. Vit gleða okkum til at halda dagarnar saman við tykkum. Gud signi framtíð tykkara. Vit elska tykkum.

Dagarnir verða hildnir á gullbrúdleypsdegnum í heimi teirra, sunnudagin 31. august frá kl. 12-18.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Familjan**



# Hergerð Joensen í Smiðjuni

**Listakvinnan Hergerð Joensen í Havn letur fríggjadagin 5. september upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík**

Hergerð Joensen hevur sína árligu málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík í døgunum 5. til 9. september 2008. Hetta er fjórðu ferð, at hon sýnir fram í Smiðjuni.

Framsýningin letur upp kl. 16.

Framsýningin verður opin frá fríggjadegnum 5. september til og við týsdagin 9. september. Opið er soleiðis: Fríggjadagin frá kl. 16-20, leygardag frá kl. 10-18 og sunnudag til týsdag frá kl. 15-18.



*Fríggjadagin, um eina viku, letur Hergerð Joensen, listakvinna, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*



Leygardagin 30. august giftast í skála kirkju Jóhan Eliasen úr Fuglafirði og Ása Súnadóttir av Skála. Vígslan verður klokkan 14, og veitslan byrjar kl. 19 í bygdarhúsinum í Leirvík.



Leygardagin 30. august giftast Esther Hammer Hvalba og Poul Carl Sørensen Trongisvágur. Vígslan verður í Ebenezer kl. 11.00. Vælkomst verður á Dánjalstrøð 5, Tórshavn frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.